

# Ása & Óli

*ein søga um*

**FORDÓMAR & FAKTA**

um Føroyar, Danmark, ríkisfelagsskapin og ES

# FORDÓMAR & FAKTA

Skulu Føroyar verða verandi í ríkisfelagsskapinum – ella eru vansarnir størri enn fyrimunirnir? Er grasið grønari í Danmark enn í Føroyum, tá tað snýr seg um sosialar veitingar?

Hvat halda føroyingar um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark – og um munin millum londini? Meiningarnar eru greiðar – men í hvønn mun byggja tær bara á fordómar?

Tað lýsa vit við hesi søguni um Ásu og Óla.

Sjúrður Skaale
Fólkatingsmaður

Um kanningina

Støðið undir hesum faldara er ein kanning, sum Lóður gjørdi fyri Javnaðarflokkin á Fólkatingi í tíðarskeiðum 24. apríl til 2. mai 2014, har 535 føroyingar í aldrinum 15-75 ár tóku lut.

# EINI FØROYSK HJÚN

Hetta er søgan um Ásu og Óla, eini føroysk hjún við tveimum børnum, Hans og Elsu.
Óli er 36 ára gamal og siglir sum maskinmeistari, meðan Ása er 34 ára gomul og arbeiðir hálva tíð sum lærari á einum skúla í Havn. Hans er 12 ára gamal og gongur í 6. flokki, og Elsa er 8 ára gomul og gongur í 2. flokki.

**Ein søga um fordómar og fakta um Føroyar, Danmark, ríkisfelagsskapin og ES.**



Henda søgan vísir nøkur brot úr gerandisdegnum hjá eini familju

# BÚÐ Í DANMARK



Óli var 20 ára gamal, tá hann møtti 18 ára gomlu Ásu á miðnámsskúlanum. Eins og helvtin av føroyingum hava tey búð í Danmark. Tey fluttu til Danmarkar, tá Ása fór undir at útbúgva seg til lærara og Óli til maskinmeistara. Stutt eftir fingu tey sonin Hans og fýra ár seinni dóttrina Elsu. Nakað eftir at Elsa varð fødd, vóru bæði liðug at útbúgva seg, og familjan flutti aftur til Føroya og búsetti seg í Tórshavn.

## HEVUR TÚ NAKRANTÍÐ BÚÐ Í DANMARK?



# SOSIALAR VEITINGAR

Tað er vetur, og Elsu og Hans tørva nýggj vetrarklæði og skógvar. Ása fer í klædnahandilin at keypa tey neyðugu klæðini, og samlaði kostnaðurin gerst 2500 krónur. Lønirnar hjá Ásu og Óla strekkja ikki til nógv meira enn føstu útreiðslurnar, so kostnaðurin av klæðunum nívir pengapungin. Hon hugsar aftur á lestrartíðina í Keypmannahavn, tá hon plagdi at fáa barnakekk triðja hvønn mánað. Hesin kekkur plagdi at koma væl við og varð millum annað brúktur til klæðir til børnini. Barnakekkur ella ikki, so skulu børnini ikki ganga køld, og Ása koyrir tí kortið ígjøgnum.

Tá hon kemur heim, situr Óli við køksborðið. Ása setir seg hjá honum, og tey tosa um munin á sosialum veitingum í Danmark og í Føroyum. Ása veit, at hon í Føroyum fær barnafrádrátt umvegis skattin, men hon er sannførd um, at tær sosialu veitingarnar í Danmark eru nógv betri enn tær í Føroyum. Óli er samdur við henni í hesum og leggur afturat, at í Danmark eru harumframt sosialar veitingar, sum ikki eru í Føroyum. Tey eru samd um at tað at hava ommur, abbar og aðra familju í og gerandisdegnum er ein stórur fyrimunur við at búgva í Føroyum.




## FAKTA

**Bústaðaráskoyti**

Í Keypmannahavn hava fólk í leigubústaði møguleika at fáa bústaðaráskoyti. Hetta verður roknað eftir flatarmáli, árligari húsaleigu og húsarhaldsinntøku.

**Dømi um bústaðaráskoyti í Keypmannahavn**

Eitt par við tveimum børnum búgva í eini trírúms íbúð á 40 fermetrar og gjalda 5.000 kr. í leigu um mánaðin. Niðanfyri eru trý dømi, um hvussu nógv mánaðarliga bústaðaráskoytið hjá parinum er við trimum ymsum inntøkum:

**Árlig inntøka 200.000 kr**
2.700 kr um mánaðin í bústaðaráskoyti
**Árlig inntøka 300.000 kr**
1.200 kr um mánaðin í bústaðaráskoyti
**Árlig inntøka 400.000 kr**
einki bústaðaráskoyti

**Í Føroyum er bert bústaðaráskoyti til fólk við kropsligum breki, sálarligum ella sosialum trupulleikum og í ávísum førum fólk undir endurútbúgving.**

MEININGAKANNING




## FAKTA

**Skattafríur barnakekkur og barnafrádráttur**

**Í Danmark**

**0-2 ár:** 17.616 kr. um árið fyri hvørt barnið.
**3-6 ár:** 13.944 kr. um árið fyri hvørt barnið.
**7-17 ár:** 10.980 kr. um árið fyri hvørt barnið.

**Í Føroyum**

Eingin barnakekkur, men harafturímóti ein barnafrádráttur - sum er ein skattafrádráttur. Hesin er ymiskur frá kommunu til kommunu. **Í Tórshavn er árligi barnafrádrátturin 14.500 kr. fyri hvørt barnið, til barnið er 18 ár.**

## FAKTA

**Fríplass á ansingarstovni**

**Í Keypmannahavn**

**Fríplass**
um húsarhaldsinntøkan er undir 161.700 kr. árliga.
**Partvíst fríplass**
um húsarhaldsinntøkan er undir 502.199 kr. árliga.

**Í Tórshavn**

**Fríplass:** um húsarhaldsinntøkan er undir 247.900 kr. árliga
**Partvíst fríplass:** um húsarhaldsinntøkan er undir 292.900 kr. árliga

## FAKTA

**Lesandi**

**Lestrarstuðulin í Danmark er 5.838 kr.** um mánaðin til lesandi á hægri útbúgvingum. Er talan um tvey lesandi við einum ella fleiri børnum, fáa bæði foreldrini 2.332 kr. í uppihaldaraískoyti um mánaðin. Bæði lestrarstuðulin og uppihaldaraískoytið í Danmark eru skattskyldug.

**Vanligi lestrarstuðulin í Føroyum er 3.815 kr. um mánaðin.** Um bæði eru lesandi, fær annað av foreldrunum 776 kr. eyka um mánaðin. Lestrarstuðulin í Føroyum er ikki skattskyldugur.

## FAKTA

**Barsilsskipan:**

Barnsburðarfarloyvið í **Danmark er 50 vikur** við barnsburðarpeningi.

Barnsburðarfarloyvið í **Føroyum er 38 vikur** við barnsburðarpeningi.

Bæði í Danmark og í Føroyum kann farloyvið leingjast í 14 vikur, men í hesum 14 vikum verður barnsburðarpeningur ikki útgoldin.

# SKATTUR

Ása klórar sær í nakkanum, meðan hon hyggur at lønarseðlinum. Kann tað passa, at so stórur partur av lønini skuldi enda í skatti? Ása trívist væl í sínum arbeiði sum lærari, men hon er sannførd um, at hevði hon havt sama starv og somu løn í Danmark, hevði hon havt nógv meira eftir, tá skattur var farin av. Sum lærari fær Ása eina miðalløn, meðan Óli sum maskinmeistari hevur eina høga inntøku. Ása verður skattað harðari í Føroyum enn í Danmark, meðan Óli verður skattaður lagaligari í Føroyum enn í Danmark



## FAKTA

Skattatrýstini í Danmark og í Føroyum eru millum heimsins hægstu. Tó er samlaða skattatrýstið í Danmark eitt vet hægri, enn tað er í Føroyum. Hinvegin er eitt hægri skattatrýst á lág- og miðalinntøkum í Føroyum enn í Danmark, meðan skattatrýstið á háinntøkur er lægri í Føroyum enn í Danmark.

MEININGAKANNING

## Hvør munur heldur tú er á skattatrýstunum í Føroyum og í Danmark?




## FAKTA

## Skatta og avgjaldstrýst á lønarinntøku í 2012




KELDA: Tøl frá almannaráðnum

MI = Miðinntøkan

# FREMMANDAMÁL & BÓKMENTIR

Ása og Óli standa í bókahandlinum og skulu keypa eina føðingardagsgávu til grannan. Tey vita, at grannanum dámar væl ævintýr, so tey hava gjørt av at keypa honum Ringanna Harri. Tá føroyska útgávan er útseld, eru tey ósamd um, hvørt hon skal vera á enskum ella donskum.

Óli vil vera við, at sjálvandi skal bókin vera á upprunamálinum, enskum. Ása tvíheldur tó um at keypa donsku útgávuna, tí nógv fleiri lesa heldur eina danska bók fram um eina enska.

## MEININGAKANNING

### HVAT FREMMANDAMÁL ER TÝDNINGARMEST AT LÆRA TÍÐLIGA Í FÓLKASKÚLANUM?

| | danskt | enskt | veit ikki |
|---|---|---|---|
| menn | 24% | 73% | 3% |
| kvinnur | 28% | 70% | |
| 15-29ár | 10% | 87% | 1% |
| 30-44ár | 35% | 65% | 1% |
| 45-59ár | 26% | 72% | 2% |
| 60-75ár | 34% | 62% | 3% |

manglandi % eru "annað fremmandamál"

### UM TÚ SKALT VELJA AT LESA EINA BÓK Á ØÐRUM MÁLI ENN FØROYSKUM, HVAT HEVÐI TÚ VALT?

| | danskt | enskt | veit ikki |
|---|---|---|---|
| menn | 67% | 29% | 3% |
| kvinnur | 77% | 20% | 1% |
| 15-29ár | 48% | 46% | 4% |
| 30-44ár | 77% | 21% | 1% |
| 45-59ár | 80% | 16% | 1% |
| 60-75ár | 84% | 14% | 1% |

FAKTA

**1938**

**Føroyskt varð góðkent sum undirvísingarmál**

**Í Føroyum læra børn**

**Danskt frá 3. flokki**

**Enskt frá 4. flokki**



Seinni um kvøldið fer Ása at hjálpa soninum Hans við skúlatingum. Meðan hon hjálpir Hans við danska stílinum, hugsar hon við sær sjálvari, at tað satt at siga hevði verið nógv meira upplagt at lært børnini enskt, áðrenn tey lærdu danskt.

Enskt er jú tað mest brúkta málið í heiminum, og børnini høvdu fingið nógv meira nyttu burtur úr at tosa flótandi enskt enn danskt. Hinvegin dugir Ása at skilja, at danskt hevur stóran týdning, tí Føroyar hava so nógv samband við Danmark og Norðurlond.

**Áhugavert er,** at hóast meirilutin av føroyingum sambært meiningakanningina hevði valt at lisið eina danska bók, so velur meirilutin enskt fram um danskt at læra tíðliga í fólkaskúlanum. Hetta kann benda á, at ein stórur partur av føroyingum dugir betur danskt, men hevði ynskt at dugað betur enskt. Tað er eisini áhugavert, at yngri føroyingurin er, meira enskt-vinarligur verður hann.

# GRUNDLÓG OG STJÓRNARSKIPAN

Tað er grundlógardagur, og Ása og børnini hava frí. Tey fara ein gongutúr í góðveðrinum. Sum tey ganga framvið løgreglustøðini, spyr Elsa forvitin, hví tað verður veittrað við danska flagginum. Ása greiðir frá, at hendan dagin hátíðarhalda vit donsku grundlógina, sum eisini er grundlóg í Føroyum.



Meðan Ása greiðir frá um grundlógina, fer hon at hugsa um, hvussu lítið danska grundlógin kennist sum sín grundlóg. Hví skal grundlógin í Føroyum vera donsk, hugsar Ása. Hon er sannførd um, at føroyingar áttu at gjørt egna stjórnarskipan, har føroyingar sjálvir avgera grundvøllin undir føroyska samfelagnum.

**2013**
Uppskot um stjórnarskipan lagt fyri Løgtingið. Felt við aðru viðgerð

**2011**
Triðja tingnevnd legði álit fyri Løgtingið. Málið datt burtur, tá tingsetan endaði

**2010**
Triðja tingnevnd sett at arbeiða víðari við málinum

**2010**
Onnur tingnevndin legði uppskot fram. Uppskot beint aftur í nevnd og datt burtur, tá tingsetan endaði

**2009**
Onnur tingnevnd sett at gera nýtt stjórnarskipanaruppskot

**2007**
Fyrsta tingnevnd sett at gera nýtt stjórnarskipanaruppskot. Datt burtur, tá tingsetan endaði

**2006**
Jólaálitið

**2004**
Fyrra flaggdagsálit

**2003**
Stjórnarskipanarnevndin sett

**1999**
Grundlógarnevndin sett

FAKTA

**Føroyska** valluttøkan til fólkatkvøðu um broytingar í grundlógini hevur verið lítil ígjøgnum árini

**2009** 11,6%
**1953** 7,6%
**1939** 8,9%
**1920** 29,9%

**1850**
Grundlógin varð sett í gildi fyri Føroyar

MEININGAKANNING

## SKULU FØROYAR HAVA EGNA STJÓRNARSKIPAN?




## KENNIR TÚ DONSKU GRUNDLÓGINA SUM TÍNA GRUNDLÓG?



# RÍKISFELAGSSKAPUR

Donsku Bent og Mette eru komin til Føroya, og tey sita í stovuni hjá Ásu og Óla og fáa sær ein temunn. Tá Óli spyr donsku gestirnar, hvat tey halda um Føroyar, eru tey ikki afturhaldandi við rósandi orðum, at føroyska náttúran er heimsins vakrasta. Prátið fellur á týdningin, sum londini bæði hava fyri hvørt annað. Bent heldur, at Føroyar eru ov dýrar í blokkstuðli. Hinvegin er hann sannførdur um, at ríkisfelagsskapurin ikki hevði verið tann sami uttan føroyska mentan.

Óli plagar at vera á Kongabrúnni, tá Dannebrog við drotningini og prinsgemalinum leggur at kei, men annars heldur hann ikki, at Danmark hevur stóran mentanarligan týdning fyri Føroyar. Øðrvísi er tó við tí búskaparliga týdninginum, sum hann metir vera stóran millum annað vegna ríkisveitingina.



MEININGAKANNING

## FØROYAR PARTUR AV RÍKISFELAGSSKAPINUM

**Í HVØNN MUN HELDUR TÚ, AT TAÐ HEVUR JALIGAN MENTANARLIGAN TÝDNING?**

47

9% svaraðu "veit ikki"

**Í HVØNN MUN HELDUR TÚ, AT TAÐ HEVUR JALIGAN BÚSKAPARLIGAN TÝDNING?**

66

8% svaraðu "veit ikki"

0 = sera illa
100 = sera væl

**Tølini siga**

Føroyingar halda, at ríkisfelagsskapurin hevur størri búskaparligan enn mentanarligan týdning, meðan danir halda, at Føroyar hava størri mentanarligan enn búskaparligan týdning



# RÍKISFELAGSSKAPUR OG DONSK UMBOÐAN Í SILDA- OG MAKRELTRÆTUNI VIÐ ES

Tað er nátturðatíð heima hjá Ásu og Óla. Tá Óli hevur smurt sær breyðflísina og letur danska blikkið við karrysildini upp, letur í Ásu, um hatta mundi vera føroysk sild. Nei, tað kundi hon ikki vera, tí Danmark sum partur av ES hevði tá eitt boykott móti at landa bæði føroyska sild og makrel, greiðir Óli frá. Ása ristir eitt sindur við høvdinum, og undrar hon seg yvir paradoksið, at Danmark boykottar Føroyar, sum er partur av ríkisfelagsskapinum. Av tí sama heldur hon, at danska stjórnin hevur gjørt lítið fyri at umboða føroysku síðuna í silda- og makreltrætuni. Óli tekur undir við henni, men tvíheldur um, at tað er týdningarmikið, at Føroyar framhaldandi skulu vera ein partur av ríkisfelagsskapinum. Ása heldur, at Ólasa hugsan er rættiliga løgin, tí hví hevur tað so stóran týdning at vera partur av einum ríkisfelagsskapi, sum ikki umboðar okkum virðiliga í altjóða málum? Tað kann væl vera, sigur Óli, men leggur aftrat, at ein eigur ikki at meta ríkisfelagsskapin eina út frá silda- og makreltrætuni, men ein skal síggja hann sum eina heild. Føroyar fáa nógva aðra nyttu úr ríkisfelagsskapinum, heldur hann fyri.

MEININGAKANNING

**HVUSSU VÆL HELDUR TÚ, AT DANMARK**

**SUM HEILD UMBOÐAR FØROYSK ÁHUGAMÁL Í UTTANRÍKISPOLITISKUM VIÐURSKIFTUM?**

39

14% svaraðu "veit ikki"

**HEVUR UMBOÐAÐ FØROYSK ÁHUGAMÁL Í SILDA OG MAKREL-STRÍÐNUM Í ES?**

33

15% svaraðu "veit ikki"

0 = sera illa
100 = sera væl



**FAKTA**

**Fiskivinnupolitikkur er føroyskt málsøki. Føroyar umboða tí seg sjálvar í fiskivinnusamráðingum**

**HVUSSU SAMD/UR ERT TÚ VIÐ HESUM ÚTSAGNUM**

**TAÐ ER TÝDNINGARMIKIÐ, AT FØROYAR VERÐA VERANDI Í RÍKISFELAGSSKAPINUM?**

63

6% svaraðu "veit ikki"

**TAÐ HEVUR ONGAN TÝDNING, UM FØROYAR VERÐA VERANDI Í RÍKISFELAGSSKAPINUM ELLA EI?**

29

10% svaraðu "veit ikki"

# ES

Tað er heyst, og Óli er farin ársins síðsta túr til skips. Ta einu frívaktina hevur skiparin bjóðað honum niðan á brúnna til ein kaffimunn. Sum Óli trínur innar, sær hann, at skiparin í stólinum starir tungliga út á hav og er sjónliga í døpurhuga. ES er nógv tann størsti marknaðurin, men skiparin er ørkymlaður av sølukvotum og tollsatsunum, sum føroyskt vinnulív skal dragast við fyri at sleppa inn á ES marknaðin. Skiparin metir, at sjálvsagt burdu Føroyar verið limir í ES.

Óli er ikki heilt sannførdur, hóast hann væl skilir ta betraðu marknaðaratgongdina, sum ES kann veita. Hann stúrir fyri, at um Føroyar innlimast í ES, er stórur vandi fyri, at føroyska fiskivinnan hoknar undan avleiðingunum. Hann heldur eitt nú, at føroyingar so ikki sleppa at áseta sínar egnu fiskikvotur og heldur ikki mega tilluta kvoturnar til sjálvvald skip. Man kann á tann hátt vænta at síggja bæði sponsk, týsk, bretsk og onnur skip í føroyskum sjógvi.

Skiparin dugir væl at síggja, at Óli hevur grein í sínum máli, men hinvegin fara føroysk skip at sleppa at fiska í øllum ES sjógvi. Óli og skiparin koma ikki til sættis, hvørt ES hevði verið ein fyrimunur ella vansi fyri Føroyar. Teir duga báðir tó at síggja, at hvørgin myndin er bara góð ella bara ring.



## FAKTA

**2005**
Føroyar gerast partur av Pan Euro Med skipanini

**1991**
Fyrsti fríhandilssáttmáli millum Føroyar og Danmark

**1974**
Føroyar velja at standa uttan fyri ES

**1973**
Danmark gerst partur av ES

MEININGAKANNING

## HELDUR TÚ, AT FØROYAR EIGA AT VERA NÆRRI KNÝTTAR AT ES?

| | | |
|---|---|---|
| 23% | ja | Tað tryggjar okkum betri marknaðaragongd |
| 25% | ja | Tað gevur størri møguleikar fyri altjóða samstarvi |
| 6% | ja | Tað gevur okkum betri rættartrygd |
| 30% | nei | Vit missa ræðið á fiskivinnupolitikkinum |
| 27% | nei | Vit missa ræðið á egnum viðurskiftum |
| 24% | nei | ES er bureaukratiskt og ódemokratiskt |
| 21% | ? | Veit ikki |

# PASS

Óli hevur fingið nýtt starv og skal sigla við einum bretskum farmaskipi. Familjan ger av at royna nakað nýtt og flytur til Bretlands í eitt tíðarskeið. Áðrenn tey flyta, skal Óli tó endurnýggja sítt pass. Hann hevur altíð havt grønt pass, men Ása sigur, at tað eru nakrir fyrimunir við reyðum passi. Ása og Óli gleða seg til nýggju avbóðingarnar uttanfyri ríkisfelagsskapin, men vænta tó, at tey flyta aftur til Føroyar einaferð.

MEININGAKANNING

## HVAT FYRI PASS HEVUR TÚ?




### FAKTA

**Við reyðum passi kann ferðast og búsetast frítt millum ES lond uttan at søkja um uppihaldsloyvi. Hetta er ikki galdandi fyri grøna passið.**

**Um ein við grønum passi flytir til Bretlands, skal søkjast um uppihaldsloyvi, um hann vil verða búgvandi har í meira enn 6 mánaðir. Reglurnar fyri uppihaldsloyvi eru ymsiskar frá landi til lands.**

ein søga um
**fordómar og fakta um Føroyar, Danmark, ríkisfelagsskapin og ES**

Javnaðarflokkurin á Fólkatingi
September 2014